Kári heldur fram í KÍF

Kári Mortensen fer aftur í komandi kappingarári at standa á odda fyri besta mansliðnum hjá KÍF. Tað skrivar Dimmalætting. Mortensen hevur verið høvuðsvenjari í Kollafirði seinastu tvey árini, og hann fer aftur í komandi kappingarári at gera eina roynd at lyfta felagið úr botninum í bestu deildini. Felagið hevur eisini gjørt avtalu við Kára Djurhuus, sum verður hjálparavenjari. Hann er ikki heilt ókendur í Kollafirði, og hann hevur í fleiri førum staðið á odda fyri besta mansliðnum. Nú verður tað so sum høgra hondin hjá Kára Mortensen, at hann skal royna seg.

Lukkaðist einki serligt

Tað hilnaðist einki serligt í báðum dystunum hjá føroyska U15 landsliðnum týsdagin, sum í hesum tekur lut í altjóðari kapping í Aberdeen. Fyrrapartin taptu føroyingarnir við 3-1 ímóti Lewis United, og seinnapartin vóru vertirnir í Aberdeen á skránni. Heimaliðið vann 2-1. Ísak Simonsen skoraði bæði málini, sum U15 fingu í gjár. Ímóti Lewis United minkaði hann til endaliga úrslitið við brotsparki, og í seinna dystinum javnaði hann til 1-1 – eisini við brotsparki. Aberdeen Internation Football Festival, sum kappingin ber heitið, heldur fram í dag. Mikudagin eru somuleiðis tveir dystir á skránni – ímóti Hetlandi og Dundee United.

eftir at vinna okkurt

an gjørdist um heilar 17 spælarar, sum fingu leikbann.

Leiðslan í City gjørdi einki við at verja teir ákærdu spælarnar, og fór ein illur Billy Meredith í bløðini og fortaldi, at leiðslan hjá City hevði goldið pening undir borðið. FA legði aftur uppí, og bannaði allari umsitingarligu leiðsluni hjá Manchester City at virka í fótbólti aftur. Felagið mátti selja allar teir góðu spælarnar, og byrja av nýggjum ítróttarliga.

Fyrstu árini æt heimavøllurin hjá City, Hyde Road. Høvuðsáskoðaraplássið á Hyde Road var herjað av eldsbruna í 1920, og sá leiðslan seg noydda til at finna ein heimavøll á einum meira hóskiligum staði. Og í 1923 flutti felagið til nýggja heimavøllin, sum lá á Moss Side, og sum fekk væl kenda navnið, Maine Road.

Vinna aftur í 1934

Ì 1926 leikti City seg loksins í FA Cup finaluna aftur. Eins og í 1904 var mótstøðuliðið aftur grannarnir úr Bolton. Men hesaferð fekk Bolton hevnd fyri tapið í 1904, og vunnu teir 1-0.

Í 1933 var City aftur í FA Cup finaluni. Teir møttu sterka Everton liðnum, sum hevði navnframa Dixie Dean á liðnum. Everton var væl betri, og vunnu teir eisini 3-0.

Árið eftir var City aftur á Wembley, og nú hilnaðist endiliga aftur. Toran gekk meðan Manchester City og Portsmouth spældu FA Cup finaluna á Wembley, og gjørdist vøllurin ræðuliga vátur. Septimus Rutherford legði Portsmouth á odda í 1. hálvleiki, og tað bar aftur ímóti tapi hjá City, men síðsta korterið fingu teir vent gongdini við tveimum málum. Fred Tilson skoraði bæði málini hjá Manchester City. Frank Swift droppaði, tá Portsmouth legði seg á odda, Fred Tilson fór yvir og troystaði blaðunga málverjan við orðunum:

- Legg ikki í hatta, eg skal nokk skora tvey mál í hinum endanum.

Í 1937 eydnaðist tað loksins City at vinna liguna, men árið eftir fluttu teir niður í 2. deild. Nú gingu aftur nøkur ár, áðrenn City vann nakað. Í 1955 vann City seg aftur í FA Cup finaluna, men taptu teir greitt 1-3 ímóti Newcastle í finaluni. Árið eftir vóru teir aftur á Wembley, og vann City tá 3-1 á Birmingham. Hetta var tann minniliga finalan, tá málverjin Bert Trautmann spældi síðstu løtuni við nøkrum brotnum geislum í nakkanum, uttan at vita tað!

Besta tíðarskeiðið

Besta tíðarskeiðið hjá Manchester City var seinast í 1960-unum, og fyrst í 1970-unum. Serliga Franny Lee var avgerandi tá liðið vann meistaraheitið í 1968, FA Cup í 1969, og Evropa Cup fyri steypavinnarar í 1970.

Í 1970 vann City eisini Liga Cup finaluni við einum 2-1 sigri ímóti West Bromwich. Í 1981 kom City aftur í FA Cup finaluna. Fyrra finalan millum City og Tottenham endaði við javnleiki 1-1. Hetta var í Replay-døgunum, og nýggj finala mátti til. Umdystin vann Tottenham 3-2, og er helst talan um eina tað bestu FA Cup finaluna nakrantíð.

Hyggja vit burtur frá Play Off-finaluni í triðjubestu deildini í 1999, so var FA Cup finalan tann seinasta finalan, sum Manchester City hevur verið í. Felagið hevur hildið sær í Premier League síðani 2002.

Felagið hevur tvær ferðir spælt seg í UEFA Cup kappingina, ikki við at vinna nakað heitið, men við fáum gulum og reyðum kortum á vøllinum. Sigast má, at felagið er væl stuðlað, tá ein hugsar um hvussu langt síðani tað er, at teir vunnu eitt heiti í enskum fótbólti. Felagið hjá enskum fótbóltsfjepparum, British Football Fans Association, hevur valt fjepparnir hjá Manchester City at verða teir mest trúgvu fjepparnar í øllum Onglandi. Felagið var heilt niðri í triðjubestu deildini og vendi, og var felagið í ringum skørum figgjarliga um tað mundið.

Hendan heiðurin vunnu teir beint frammanfyri Liverpool og Portsmouth. City-viðhaldsfólk halda fast við, at City er betri umtókt í Manchester býi, enn United. 40% av teimum, sum hava árskort til dystir hjá Manchester City búgva í Manchester, meðan bara 29% av teimum, sum hava árskort til heimadystir hjá Manchester United búgva í Manchester.

Í 2003 flutti felagið til tað sera snøgga City of Manchester Stadium, aftaná at hava spælt á Maine Road í 80 ár. Nú byrjar so eitt nýtt tíðarskeið við einum nýggjum venjara, sum annars hevði sína bestu tíð sum fótbóltsspælari í Manchester United, nevnliga Mark Hughes. Hughes hevur eisini eina fortíð, sum waliskur landsliðsspælari, og var hann við Wales á Svangaskarði í juni 1993. Ein dystur, sum Wales vann 3-0. Eftir tí, sum ein kann lesa veit Hughes ikki av, at undirsjóvartunnlar eru komnir í Føroyum, síðani hann var her seinast. Hann minnist væl aftur á allar ferjurnar, sum teir máttu brúka fyri at koma fram til vøllin, har teir skuldu spæla. Manchester City tystir veruliga eftir at vinna eitt heiti aftur, og UEFA Cup høvdu teir ikki sagt nei til. Men fyrsta forðingin á leiðini er EB/Streymur.

City áskoðararnir eru kosnir at vera teir mest trúðføstu í enskum fótbólti. Og trúðfesti fekk teirra upplivdi sviin Sven-Goran Eriksson, sum í fjør fekk sekkin sum venjari, eftir at hann annars hevði skaffað felagum hampilig úrslit

Mynd: Polfoto